# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Einki avgjørt enn

**Porto, Barcelona og Arsenal fingu sær rættiliga góð útgangsstøði til returdystin. Manchester United helt nullið, men nú lúrir vandin fyri einum útivallarmáli á Old Trafford**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Robin van Persie skoraði sigursmálið hjá Arsena*

Manchester United hevði nóg mikið av málmøguleikum til at vinna dystin ímóti Inter í Milano ígjár. Serliga í 1. Hálvleiki burdi útiliðið havt skorað, men Christiano Ronaldo varð ikki nóg skarpur. Inter-málverjin, Julio César hevði eisini nógvar góðar bjargingar. Heimaliðið var betri við í 2. Hálvleiki. Venjarin hjá Manchester United, Alex Ferguson harmaðist um, at tað ikki eydnaðist at hála ein sigur í land, aftaná so nógvar stórar málmøguleikar: - Vit høvdu nógvar stórar málmøguleikar, og eg vóni sanniliga ikki, at vit verða revsaðir fyri okkara manglandi mál her í Milano. Spælarnir hjá mær eru eisini vónsviknir um, at teir ikki vunnu. Men við okkara góðu hagtølum á heimavølli, so sær tað enn gott út hjá okkum, segði Alex Ferguson. Inter-venjarin, Jose Mourinho heldur, at tað sær eisini gott út hjá teimum: - Tá eg vann Champions League við Porto í 2004, tá spældu vit 0-0 í hálvfinaluni ímóti Deportivo La Coruna, men vit vunnu útidystin. Segði Mourinho aftaná dystin, sum rósti Inter-málverjanum, Julio Cesar til skýggja: - Hann var fantastiskur í 1. Hálvleiki, har hann hevði 2-3 risabjargingar, og tað hevði sera stóran týdning fyri liðið. Staðfesti Mourinho.

### Wenger ikki heilt nøgdur

Hóast Arsenal helt málið reint á heimavølli, og vann 1-0 á Roma, so ergraði Arsenal-venjarin, Arsene Wenger seg um allir teir brendu málmøguleikarnar. Arsenal svam í málmøguleikum, og tað var serliga danski framherjin, Nicklas Bendtner, sum brendi illa, og Arsenal fekk bert bóltin í Roma-málið við einum brotssparki, sum Robin van Persie setti í netið. Aftaná dystin segði Arsene Wenger: - Eg eri nøgdur við hugburðin hjá spælarunum, men sjálvandi burdu vit havt skorað fleiri mál. Tað er tað einasta vit kunnu verða misnøgdir um. Ein veit ongantíð hvussu ein skal útgreina eitt gott úrslit í Europa. Men vit hava sæð, at vit kunnu skapa stórar málmøguleikar ímóti Roma, og á tí jaligu síðini, kunnu vit eisini siga, at teir skoraðu ikki ímóti okkum. Nicklas Bendtner varð tikin út eftir 57 minuttirs spæl.

### Málríkari í Madrid

Atletico Madrid legði hart út ímóti Porto, og longu aftaná tríggjar minuttirs spæl, fingu teir løn fyri stríðið, tá Maxi Rodriguez endaði eitt skjótt spælt mótálop, og legði heimaliðið á odda 1-0. Men sum 1. hálvleikur leið komu gestirnir úr Porto meira og meira við í spælið, og tað var als ikki óuppiborið, tá toppskjúttin Lisandro javnaði til 1-1. Atletico Madrid legði seg tó aftur á odda áðrenn steðgin, takka verið einum risastórum málmansdroppi hjá Porto-málverjanum, sum misti eina veika skotroynd hjá Diego Forlan inn í málið. Eitt drop av teimum heilt stóru. 2. hálvleikur var ikki líka lívligur, og tað var longri ímillum teir stóru málmøguleikarnar. Atletico Madrid hevði heldur meir av spælinum, men tað var kortini Porto, sum fekk javnað, tá Cisskos fann Lisandro, sum kundi skorað mál nummar 8 í Champions League frá stuttari fjarstøðu. Barcelona fekk eitt gott útgangstøðið ímóti franska meistaraliðnum, Lyon. Lyon byrjaði kortini best, og longu aftaná 7 minuttirs spæl, skoraði Juninho fyri heimaliðið. Thierry Henry javnaði tó, tá 67 minuttir vóru spældir. Returdystirnir verða spældir mikukvøldið 11. mars.

## Champions League, fyrra 1/8 finalan

**Inter Milan - Manchester United 0-0**

**Arsenal - Roma 1-0 (1-0)**
**1-0** Robin van Persie 37. min (brotsspark)

**Lyon - Barcelona 1-1 (1-0)**
**1-0** Juninho 7. min
**1-1** Thierry Henry 67. min

**Atletico Madrid - FC Porto 2-2 (2-1)**
**1-0** Maxi Rodriguez 3. min
**1-1** Lisandro Lopez 22. min
**2-1** Diego Forlan 45. min
**2-2** Lisandro Lopez 72. min

# Klassikari í Madrid í kvøld

**Tvey av heimsins best umtóktu liðum, Real Madrid og Liverpool spæla í kvøld**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Dystirnir í kvøld eru hesir: Real Madrid-Liverpool, Chelsea-Juventus, Sporting-Bayern Munchen og Villareal-Panathinaikos. Spania og Ongland hava veruliga sett seg tungt á Champions League í ár. Londini hava 4 lið hvør í 1/8 finalunum í Champions League. Kortini er bert ein ensk-sponsk uppgerð, og er hon millum Real Madrid og Liverpool. Real Madrid hevur koyrt væl seinastu tíðina, og hava teir vunnið nógv. Hetta hevur kortini ikki verið nóg mikið til at stilla krøvini hjá sponsku pressuni, og krevjandi áskoðarafjøldini á Santiago Bernabau. Real Madrid er rættiliga langt aftanfyri Barcelona í sponsku kappingini, og fara teir tískil at leggja nógv fyri at kunna vinna seg víðari í Champions League. Tað hevur tó ikki roynst væl hjá Real Madrid í 1/8 finalunum seinastu árini. Seinastu 4 árini, er liðið nevnliga rokið út í júst 1/8 finaluni. Ùt frá teimum hagtølunum, so má Liverpool sigast at verða favorittur. Liverpool hevur rokkið fleiri hálvfinalum og finalum seinastu árini.

### Hinir dystirnir

Panathinaikos er betri fyri í griksku kappingini, enn Villareal, sum ikki hevur kunnað fylgt við toppliðunum í Primera Liga. Villareal hevur bara vunnið ein av teimum seinastu 8 dystunum í sponsku kappingini. Jurgen Klinsmann hevur fingið kombinasjónsspælið hjá Bayern Munchen at rigga, og tað er júst tað, sum skal til fyri at kunna basa tí formsterka og verjusterka Sporting-liðnum úr Portugal. Claudio Ranieri varð tann fyrsti venjarin, sum russiski Chelsea-ánarin, Roman Abrahamovic sparkaði úr starvi. Nú fær Ranieri so møguleikan at sláa Chelsea úr Champions League kappingini. Tað skuldi ikki verið heilt ómøgligt, tí Chelsea virkar ikki líka sterkt, sum liðið hevur verið tey undanfarnu kappingarárini. Kortini er gongdin ikki nógv frægari hjá Juventus, so bæði liðini hava hart brúk fyri at sleppa víðari í Champions League kappingini.